# Tíðindasíður

Her verður víst, hvussu ein tíðindasíða er skipað.
Greitt verður frá hugtøkunum yvirskrift, bókstavarím og at vera óheft/ur.

Tíðindasøgan




**Yvirskrift**
Góða yvirskriftin svarar spurningunum: hvør, hvat, hvar. Harumframt skal yvirskriftin fanga áhugan hjá lesaranum, og hon verður skrivað við feitum.

**Bókstavarím**
Her er talan um orð, ið byrja við sama bókstavi ella ljóði, og harumframt standa hvørt eftir annað. Bókstavarím ljóðar væl í yvirskriftum og lýsingar-tekstum, til dømis *Forvitnisligur firvaldur í Funningi*, ella *Talandi tónar í Tjørnuvík*.

**Óheft**
At vera óheftur merkir, at tú ikki ert í parti við nøkrum ella gevur nøkrum framíhjárætt. Tínar kenslur og meiningar skulu ikki síggjast aftur í tíni miðling, ið skal vera so neyv og saklig sum til ber. Tað kann vera trupult at vera púra óheft/ur, men tað ber til at gera sær ómak.

Nem í sætta síða 58, 70, 72